# Munandi betri

*Hóast tað aftur hesu ferð gjørdist til eitt tap til B36, so var stórur munur á fyrra og seinna Europa-Cup dystinum móti AB*



*Serliga í fyrra hálvleiki var Mikkjal Thomassen millum teir mest sjónligu á B36-liðnum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Jákup Mørk

Tá B36 leikararnir fyri 14 døgum síðani fóru av váta grasinum í Gladsaxe, høvdu teir ivaleyst bestan hug at krógva seg einhvørja staðni.

Teir høvdu tá júst verið offur fyri næst størsta tapinum í stuttu søguni hjá føroyskum felagsfótbólti í altjóða høpi, so einki var at siga til, um lagið ikki var av tí besta. Tað átti tað heldur ikki at verið.

**Ressaðust**

Hóskvøldið fóru B36 leikararnir av váta grasinum á Tórsvølli, men hesu ferð bóru teir høvdið nakað væl hægri enn í Gladsaxe.

Undan dystinum varð mest tosað um, at nú skuldu leikararnir reisa seg og prógva, at stórtapið á útivølli var niðri á lágmarkinum fyri, hvat liðið veruliga megnaði.

Hetta eydnaðist eisini í stóran mun, tí hóast AB mest av øllum stillaði upp við einum at kalla eykaliði, megnaði B36 veruliga at seta sín dám á dystin.

Frá fyrsta bríksli var líkt til, at B36 leikararnir ætlaðu sær at vera við í dystinum, og ikki gingu nógvir minuttir, áðrenn hetta kastaði ein góðan málmøguleika av sær. Magni gav sær tó ov góðar stundir, og so var góði møguleikin burtur. Ikki tí, tað var als ikki soleiðis at B36 domineraði dystin á nakran hátt, tí akademisku gestirnir høvdu so avgjørt eisini sínar møguleikar. Millum fleiri góðar møguleikar høvdu teir eitt skot frá málteiginum, sum støkk út aftur av samankomingini.

Teir svørt hvítu fullu tó ongantíð í fátt av hesum, og hóast tað restina av hálvleikinum ikki varð talan um teir heilt stóru møguleikarnar, so megnaðu teir kortini at skapa nakrar vandastøður framman fyri AB málið. Nærmast mundi pólverski Maryniak vera, eftir at Darius Magdisauskas hevði stútað frísparksinnlegg niður.

**Allir komu við**

Í fyrra hálvleiki var tað serliga mitt á miðvøllinum og í verjupartinum, at B36 leikararnir stóðu seg væl. Serliga var tað Mikkjal ein legði til merkis á miðvøllinum, har hann, líkamikið hvussu trongd støðan var, altíð sá út til at hava góða tíð. Við liðini av honum stríddist ungi Klæminst Matras óført, og hóast hann, sum dysturin leið, mundi fáa nakrar álbogar frammaná, helt hann alla tíðina á við sama lag.

Teir tríggir í miðverjuni vóru eisini sera sjónligir allan dystin, og teir tóktust als ikki at hava somu trupulleikar av mótstøðumonnunum, sum teir høvdu í útidystinum. Egil tók kanska ikki so nógv lut í uppspælinum, men hann fekk fatur á sera nógvum. Jens Kristian var í samfullar 90 minuttir ein teirra, sum skapti frið yvir B36 spælið, hóast tað í summum førum sá heldur sløsut út, og so var tað eisini Darius, sum so avgjørt var besti verjuspælarin hendan dystin. At hann er vanur við at spæla á grasi var sjónligt, og í flestu førum slapp hann sær skilagott av við bóltin. Stødd hansara viðførir eisini, at hann vinnur so at siga alt í luftrúminum, og tað var ikki fyrr enn at AB í seinna hálvleiki skifti Abdul Sule inn, at talið av vunnum luftvóltum mundi fara niður um 95%.

Í síðunum báðum var uppgávan hjá Jan Guttesen og Carl Høgnesen í stóran mun at verja fyri, so AB ikki fekk spælt seg ígjøgnum, og hetta eydnaðist eisini sera væl. Serliga Carl kom væl frá hesum, og hóast hann fyrst og fremst skuldi ansa eftir verjupartinum, kom hann í fleiri førum sera væl við frameftir vøllinum.

Jan tóktist fyrstu trý korterini rættuliga óvandur á bakkplássinum, har hann bert hevur fáar dystir á baki, men sum altíð var hann raskur í verjupartinum. Í seinna hálvleiki kom hann nógv betur við í spælið, eisini frameftir vøllinum.

Fyri at gera miðvøllin meira kompaktan, hevði svenski Pelle Andersson valt bert at hava ein mann heilt frammi, Maciej Maryniak, meðan Magni á Lakjuni og Dánjal Petur Johansen so skuldu stuðla upp undir.

Av hesum trimum var tað serliga Magna, sum tú legði til merkis. Hann bjóðaði seg væl til, tá takast skuldi ímóti bóltinum, og tordi eisini væl at bjóða av ein móti einum. At teknikkurin er í einnum flokki fyri seg, er eingin ivi um, men hinvegin er tað ov sjáldan, at hann veruliga roynir at seta seg ígjøgnum, og ov ofta verður talan um ov nógv pilkarí frá hansara síðu.

Piddi arbeiddi, eins og hann altíð ger, sera nógv, og var hann tann av áleyparunum, sum í størstan mun var við til at leggja trýst á mótstøðuliðið. Maciej tóktist ofta vera í so einsamallur, men hann royndi tó kortini tað hann kundi at arbeiða fyri liðið. Trupulleikin tykist tó at vera, at hann enn ikki er follin rættuliga inn á liðið, og at tað tískil ikki fæst nóg nógv burtur úr evnum hansara.

**Skilagott**

Í seinna hálvleiki royndu AB at seta meira ferð á dystin, og partvíst eydnaðist hetta eisini. B36 leikararnir tóktust tó eisini at koma alsamt betri við, og tað tóktist sera skilagott, tá teir í flestu førum royndu at taka ferðina av spælinum, tá teir sjálvir høvdu bóltin.

Møguleikarnir hjá AB vórðu í flestu førum avmarkaðir til skot útifrá, og hóast okkurt av hesum hevði kós móti málinum, so var leingi líkt til, at javnleikur skuldi gerast endaliga støðan. Ikki minst eftir at Tróndur hevði havt eina frálíka bjarging heilt uppi í málhorninum. Tróndur tykist annars rættuliga at hava sett seg fastan á málverjasessin í felagnum. Hóast hann bert hevur verið málverji í fá ár, eru evnini eyðsýnd, og harumframt ger fortíð hansara sum útileikai, at hann er tryggur, tá bólturin verður spældur aftur til hansara.

Tá málið kom, var málverjin tó prísgivin. Eftir hornaspark og stútara eitt sindur úteftir, kom Alex Nielsen við fullari ferð og heilfluktaði bóltin móti málinum. Tróndur hevði hondina á skotinum, men fekk kortini ikki vart fyri, og so gekk tað, sum tað so oftani fyrr hevur gingist føroyskum liðum. Eitt heiðurligt tap.

**Royndu at javna**

B36 leikararnir tóktust tó als ikki at vera nøgdir um hetta, og eftir leiðslumálið hjá gestunum, hevði heimaliðið sína bestu løtu.

Teir royndu alsamt at koma longur niðan á vøllin, og í fleiri førum eydnaðist tað at seta AB verjuna undir trýst, soleiðis at vit nú brádliga eisini sóu mistøk frá teirra síðu. Tríggjar útskiftingar vórðu framdar, og serliga ein av hesum, ta Håkan Lundholm kom á vøllin, tóktist at muna. Håkan hevur higartil í ár ikki verið tann fongur, sum viðhaldsfólkini hjá B36 høvdu vóna, men tað korterið, sum hann var á vøllinum, sýndi hann tað besta spælið, hann higartil hevur víst fyri B36.

Hann var eisini maðurin aftan fyri størsta málmøguleikan, sum B36 hevði í dystinum, tá hann í 92. minutti dribblaði og takklaði seg ígjøgnum miðverjuna hjá AB. Endin varð, at Magni gjørdist púra leysur, men tá hann royndi at lobba upp um málverjan, skrúvaði bólturin út um handara stólpa, og nærri enn hesum sama kom B36 ongantíð.

Samanlagt hevði havnarliðið tó stóran heiður av dystinum, og teir fingu eisini í stóran mun ta uppreisn, sum teir søgdu seg vilja hava undan dystinum.



*Magni á Lakjuni hevði ein risa møguleika móti endanum, men nærri kom B36 ikki einum máli*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**UEFA Cup**
**B36-AB 0-1 (0-0)**
AB víðari við samanlagt 9-0

0-1: Alex Nielsen 70.

**Dómarar úr Belgia:**
Eric Romain, Henri Kums, Marc Engelen – Johan Verbist
UEFA umboð: Kaj Natri

**B36:**
Tróndur Vatnhamar – Jan Guttesen, Darius Magdisauskas, Egil Zachariassen, Jens Kristian Hansen (liðformaður), Carl Herup Høgnesen – Mikkjal Thomassen (Rógvi Róin 81.), Dánjal Petur Johansen (Håkan Lundholm 75.), Klæmint Matras, Magni á Lakjuni – Maciej Mayniak (Jørgen Meitilberg 56.)

**AB:**
Brian Flies – Jan Bjur, Peter Frank, Alex Nielsen– Nikolaj Stokholm (Jan Michaelsen 5.), Nikolaj Hust, Lars Bo Larsen (Rasmus Gren Jørgensen), Peter Knudsen, Jesper Sørensen – Kaan Metin, Rasmus Daugaard (Abdul Sule 60.)



# Flott avrik frá GÍ

*GÍ framdi eitt lítið bragd, tá teir máttu lúta 2-1 fyri IFK Norrkøping í seinna dystinum liðanna millum. Seinastu 50 minuttirnar spældu gøtumenn nevnliga 10 móti 11*



*Sunnvard Joensen fekk reytt kort stutt fyri hálvleik, men kortini stóð GÍ seg sera væl við 10 monnum móti 11* *Mynd: Mikael Strand*

Jákup Mørk

Tað vóru fegnir gøtumenn, sum vóru at hoyra í telefonini, tá vit seint hóskvøldið fingu fatur á teimum.

Teir vóru tá lidnir at takast at við svenska IFK Norrkøping, og hóast talan aftur hesu ferð gjørdist um tap, so er einki at ivast í, at samanlagt varð tað GÍ, sum stóð seg best av teimum føroysku liðunum hetta summarið.

**Byrjaðu væl**

Henning Jarnskor, sum eins og vanligt taldist millum teir 11 gøtumenninar á liðnum, greiddi frá, at teir høvdu sett sær fyri, at teir komu til Svøríki fyri at vera við til at skapa ein góðan fótbóltsdyst.

Í útgangsstøði høvdu teir eisini tveir áleyparar, og tað eydnaðist eisini sera væl at fáa flutt spælið nakað niðan á vøllin, so talan ikki alla tíðina gjørdist um gúpparí niðaneftir.

Tá GÍ fyri fjúrtan døgum síðani vóru vertir fyri Norrkøping, nýttu teir fyrsta hálva tíman til at koma fyri seg. Ein hálvur tími, har svenskarar lættliga kundu fingið okkurt málið, um neyvleikin var til staðar. Seinni komu gøtumenn tó væl við, men tað var kanska væntandi, at ógvusliga byrjanin frá fyrra dystinum skuldi endurtakast.

Hetta hendi tó ongantíð, og sambært Henning komst hetta av, at teir beinanvegin fingu tak á síðunum, so svenskararnir ikki sluppu at spæla sítt vongspæl, við vandamiklum innleggum frá baklinjuni.

Ístaðin noyddust teir at royna seg upp eftir miðásini, og tá talan tá ofta gjørdist um høgar bóltar mitt fyri, so var lag á manni hjá Bartali og Poul at skalla hesar burtur.

Fyrstu 40. minnuttirnar eydnaðist tað so gøtumonnum at halda vertunum fullkomuliga burtur frá málmøguleikum, men so hendi tað, sum absolut ikki skuldi henda.

Ein svii slapp at halda beina leið móti málinum, og tá Sunnvard kendi seg noyddan at taka beinini undan honum, var dómarin eirindaleysur. Brotsspark til Norrkøping og reytt kort til Sunnvard.

**Óneyðugt tap**

Gøtumenn høvdu roknað við, at svenskararnir fóru at koma sum eitt óløgi í seinna hálvleiki, nú teir høvdu ein mann í yvirtal.

Hetta hendi tó als ikk, og ístaðin var tað GÍ, sum hevði fleri góðar royndir beinanvegin eftir steðgin. Ein av hesum royndum kastaði eitt fríspark av sær, og hesum tilboði tók Súni Olsen sær av. Bólturin varð sendir beina leið upp í málhornið, og fyrsta (og einasta) føroyska UEFA málið í ár varð veruleiki.

Hóast teir framvegis vóru í undirtali, so megnaði GÍ eisini eftir hetta at halda fast um skilagóða verjuspælið, soleiðis at vertirnir ikki sluppu fram at teimum góðu málmøguleikunum. Tað kundi kanska eisini eydnast teimum at fingið javnleikin til høldar, men eitt heldur óneyðugt mál til Norrkøping forðaði fyri hesum.

Eitt kiksað útspæl frá málverjanum datt fyri føturnar á Pär Andersson, og einsamallur móti málinum kundi hann aftur leggja heimaliðið framum.

**Flott avrik**

Hóast tað sostatt aftur gjørdist til eitt tap hjá GÍ, so er einki at taka seg aftur í, at teir kunnu vera ernir av sínum avriki í europeisku dystinum í summar.

Samanlagt vóru teir tað føroyska liðið, sum stóð seg best, og hetta er ikki bert galdandi, tá talan er um samlaða úrslitið av báðum dystunum.

Ikki minst tann sannroynd, at teir í 50 minuttir hildu mótstøðumonnunum, hóast ein leikara í undirtal, boðar frá eini væl eydnaðari luttøku, og eftir dystin tóktust teir eisini at vera sera væl nøgdir um avrikið:

- Hetta er so avgjørt nakað, sum vit læra av og taka við okkum til komandi landskappingardystirnar, helt Henning Jarnskor eftir dystin. - Serliga var tað avrikið í verjupartinum, sum var sannførandi, men vit mugu royna at vera eins væl konsentreraðir, tá talan er um dystir í heimligu kappingini. Har haldi eg, at vit hava givið alt ov nógvar møguleikar frá okkum, og tað hevur eisini kostað nógv.

Hvat GÍ so megnar at avrika tað, sum eftir er av kappingarárinum, er so ein onnur søga, sum ikki er liðug enn.

Eftir stendur tó, at teir í ár framdu klárt tað avrikið hjá føroyskum liðum í europeiskum høpi, og hetta kunnu bæði leikarar og venjari vera ernir av.

**IFK Norkkøping-GÍ**
**2-1 (1-0)**
IFK Norrkøping víðari við samanlagt 4-1

1-0: Mattias Flodstrøm 40. (br.)
1-1: Súni Olsen
2-1: Pär Andersson 56.

Reytt kort: Sunnvard Joensen, GÍ 40.

**Dómarabólkur úr Luksemburg:**
Henri Diederich, Arsene Lallemang, Francis Crelo – Luc Wilmes

**IFK: Norrkøping:**
Eddie Gustafsson – Mikael Strøm, Stefan Alvén, Fredrik Bild, Mathias Florén – Pär Andersson, Mattias Östberg, Klebér Saarenpää (Jonas Wallerstedt 64.), Jonas Bjurstrøm – Mattias Flodstrøm, Mathias Gravem (Patrik Jønsson 64.)

GÍ:
Sunnvard Joensen – Poul Ennigarð, Bartal Eliasen, Leivur Hansen – Áslakur R. Petersen, Súni Olsen (Poul Henning Jacobsen 65.), Jóan P. Olsen, Magni Jarnskor, Henning Jarnskor – Helgi L. Petersen (Óli Hansen 82.), Hans Pauli Petersen (Hallur Hansen 40.)

1950 - 2000
FARODANE
50

Móttøka

Í sambandi við at
Farodane 1. september 2000
fyllir 50 ár bjóða vit til móttøku
í virkisbygningi okkara
í Brekkutúni 4

**fríggjadagin 1. september**
**kl. 15.00 - 18.00**

FARODANE
Brekkutún 4 - FO-100 Tórshavn - Tlf. 311414 - Fax 317534
www.farodane.fo